# Miðvikan

## Janus í Dímun:

# Abbi misti tvær konur, sjey børn, sjónina og lívið



**Fyrsti partur av søguni hjá Janusi endaði við, at oldurabbi hansara datt oman í stóru Dímun, og hann varð tikin upp av húskallinum Óla Jákup Johannesen**

**2. partur**

### Langabbi giftist við henni, sum fyrst ikki skoytti um hann

Hesin Óla Jákup Johannesen bleiv langabbi mín. Langabbin, sum var úr Dali, fríggjaði til ta eldru dóttrina hjá oldurabba Sunnevu Elisabeth f. 1831, men hon vildi ikki giftast við honum. Hon bað ta yngru systrina, Onnu Margrethu f. 1837, gifta seg langabba. Samstundis segði Sunneva festið frá sær, so tað kundi falla til langabba.

Tey bæði fingu tveir dreingir. Tað var abbi mín Janus Ola Jacobsen f. 1862 og Johannes Ola Jacobsen f. 1864, abbi til Jóannes á Toft úr Dali.

Tann eldra systirin bleiv verandi í Dímun eftir, at tey bæði giftust. Men so hendir tað, at Anna Margretha doyr 8. februar 1865 átta vikur eftir, at Johannes var føddur. Hon gjørdist bert 27 ára gomul.

Áðrenn Anna Margretha slóknaði, bað hon systir sína um at taka sær av børnunum. Tað lovaði hon og helt tað til lítar. Stutt eftir giftist hon við Óla Jákupi, sum hon upprunaliga ikki vildi hava.

Tey fingu ein son, kallaður Óla Jákup Ole Jacobsen f. 1867. Sunneva bleiv heldur ikki serliga gomul. Men Gudrun, mamma tær báðar, livdi eftir og tók um endan. Hon hevur tað eftirmæli, at hon var eitt sjáldsama gott fólk.



*Niels Petur Thomsen í Króki gekk á odda upp gjøgnum frystu Kleivina*

### Janus abbi fekk eina harða lagnu

Abbi, Janus, varð føddur í 1862. Hann tekur so við seinast í 1880-unum, tá ið pápin leggur tað frá sær.

Janus abbi giftist við Onnu Margreth Johannesen f. 1859 úr Gerðabrekku í Skálavík. Hon var fastur til millum onnur Viderø prestin. Pápi og Kristian Osvald Viderø vóru tískil systkinabørn. Tey áttu sjey børn, men tað var bara pápi, sum livdi pápa sín av. Trý tey fyrstu doyðu sum heilt smá.

Tann fyrsti sonurin tey áttu han æt Óla Jákup føddur 1889. Hann druknaði trý ára gamal í einum dammi, sum var beint vestanfyri húsini. Hetta var ein dammur, sum neytini plagdu at drekka úr, tá ið tey vóru úti.

Tað, sum hendi, var, at í gomlu roykstovuni í Dímun vóru tvær útgongdir, ein á hvørji síðu.

Abbi skuldi ansa eftir soninum. Hann hevði fingið ein lítlan bát í hondina, og uttan at abbi visti av tí, var hann farin út gjøgnum hina hurðina, har tað ikki var vanligt at ganga.

Tá ið nakað er umliðið, saknar abbi drongin og finnur hann deyðan í hylinum, sum er beint norðanfyri endan á húsinum. Tætt við flýtur tann lítli báturin. Ivaleyst er drongurin farin eftir høvdinum útí. Hylurin var nærum upptornaður. Drongurin var dottin fram eftir rommum í rununa og hevur ikki klárað at reisa seg upp aftur.

Tá áttu tey Johannes f. 1891. Men í 1893 fingu tey aftur ein son Óla Jákup, pápi mín, uppkallaður eftir tí deyða beiggjanum.

Anna Margretha doyði sjálv á barsilssong við tí sjeynda barninum. Janus giftist upp aftur við Onnu Sofíu, f. 21. august 1861 úr Húsavík, sum hevði verið á bóndagarði niðri og nomið sær kunnleika innan bóndaskap. Hon útvegaði nútímans tól, eitt nú sentrifugu. Anna Sofía og Janus fingu tvey børn, sum bæði doyðu. Anna Sofía doyði sjálv á barsilssong við tí seinna.

Janus giftist upp aftur á triðja sinni við Guðrun Anthoniussen úr Húsavík, f. 1880. Tey fingu seks døtur.

Janus var dugnaligur bóndi. Hann kom víst til búgvið borð, har alt var í góðum standi. Men hann helt tað viðlíka og lata gera nógv nýtt. Hann lat gera grótgarð at verja fyri stormi. Tað var hann sjálvur og synir hansara Jóhannes og Óla Jákup, sum gjørdu tað mesta av arbeiðinum. Hann lat eisni vatn leggja til húsini, sum var eitt stórt framstig.

Hann gjørdi meira við mjólkineyt enn gjørt var frammanundan. Tí stóðu neytini meira inni um veturin. Talið av ungneytum og geldneytum var so tilpassa til tað.

Janus lat byggja neyst í Barminum, men tað var so óhøgligt, at tað bert varð nýtt at hava bát í um veturin. Men takkað veri neystinum misti hann ikki so nógvar bátar sum annars var vanligt.

Janus hevði gingið í skúla hjá Óla Nikláa Skaalum í Hvalba. Hann las nógv og átti eisini nógvar bøkur.

Janus hevði ónáttúrliga nógvan mótgang. Tilsamans átti hann 15 børn. Sjey av teimum misti hann, tá tey vóru smá. Tvær ferðir gjørdist hann einkjumaður.

Sjónina misti hann 40 ára gamal. Hann fór til Danmarkar at royna at bjarga sjónini men til fánýtis.



*Lendingin í Dímun*



*Undir góðum umstøðum ber væl til at koma upp gjøgnum Kleivina. Men sum umstøðurnar vóru umrødda dag í 1918 var tað nærum ómøguligt. Men tað eydnaðist kortini*

### Tá ið hvalbingar settu upp í Stóru Dímun

Í 1895 hendi nakað púra óvæntað í Stóru Dímun. Hetta var, tá ið hvalbingar settu upp í oynni undir umstøðum, sum skuldu gjørt hetta ómøguligt.

Men søgan var tann, at sandoyarprestur Jørgen Falk Rønne var staddur í Suðuroy og skuldu hava skjúts úr Hvalba til Sandoyar. Veðrið var gott, tá ið farið verður. Men táið teir koma millum Stóru Dímun og Dalsfles brestur á við stormi og kavaroki av landnyrðingi.

Teir royndu at venda aftur, men hetta gekk illa. Teir fingu eitt brot, sum fylti bátin. Men tá teir koma inn í Dreingjannastøð undir Kleivini á Stóru Dímun, gjørdist so mikið kyrt, at teir kundu fáa bátin uppá turt.

Men hetta hjálpti ikki nógv, tí Kleivin sjálv var fullkomiliga avísað, so har var ikki hugsingur um at fara upp á oynna. Men tað var skjótt, at teir komu til, at gjørdu teir einki, so var deyðin undir øllum umstøðum vísur. So Niels Petur í Króki setti sær fyri at royna at koma upp á oynna, og at hjálpa sær fekk hann Palla í Røvaragili.

Niels Petur fór undan, høgdi sær spor í ísinum, hjálptur av Palla. Tað ótrúliga hendi, at tað eydnaðist teimum at koma uppá slætt. Hetta var eitt satt bragd.

So at fara til bóndahúsið, har teir bankaðu uppá hurðina. Inni blivu tey illa við, tí í slíkum útideyðaveðri skuldi einki ókunnugfólk kunnað komið hagar. Men upp varð latið, og tað var skjótt, at hendur fekst á bjargalínuni at fáa hinar upp eisini. Tað gekk væl. Ein húskallur ella bóndin, frásagnirnar eru ymiskar,